# 2010 TEY HYGGJA INN Í KRYSTALLKÚLUNA

**LAGT TIL RÆTTIS:** Heini í Skorini

## »Eg vænti eitt ríkt listarligt ár«



### ODDFRÍÐUR MARNI RASMUSSEN

*formaður í Listafólkasambandi Føroya (LISA)*

**Hvat væntar tú av føroyskari list í 2010?**
Um eg skal døma frá 2009, so fer 2010 at skikka sær væl. Í gjøgnum allar tíðir hevur listin verið ymisk í góðsku, og soleiðis verður eisini í 2010. Eg vænti, at tónleikurin, bæði partiturtónleikur og poppur, fer at bjóða nógv gott. Eitt nú Tróndur Bogason og Teitur, Eivør og Guðrið Hansdóttir. Bókmentirnar fara at koma meir út í Danmark, við tað at Hugin Eide hevur stovnað Forlagið Tórgarð, og í Norra fara eisini fleiri føroyskar bøkur at koma út. Myndlistin er í spennandi menning, tí nógv ung eru komin inn í myndlistalandslagið (hóast tey ikki mála landslagsmyndir), so sum Silja Strøm, og Steinprent gevur myndlistafólkum nýggjar møguleikar. Nógvir góðir sjónleikir verða sýndir á Tjóðpallinum í 2010. Eg vænti, at vit fáa eitt listaríkt 2010, ið verður eitt framhald av 2009 á øllum økjum, og 2009 hevði nógv gott at bjóða.

**Hvat vónar tú fyri føroyskt mentanarlív og føroyskan mentanarpolitikk í 2010?**
Nógv mentanarlív er í Føroyum. Tó manglar at seta við, at ungdómurin eisini fær atgongd til tað, sum rørir seg í mentanarlívinum. Tiltøkini Ung í Føroyum og Listaleypurin eru gongdar leiðir. Vónandi verður Mentanargrunnur landsins umskipaður til eitt Listaráð. Vónandi flytur Tjóðpallurin í nýggj hølir. Vónandi verður alt málpolitiska álitið, Málmørk, sett í verk. Vónandi finst ein góð loysn á upphavsrættinum, soleiðis at ikki allir pengarnir fara til umsiting í staðin fyri til listafólkini. Og eg vóni, at ein millión av teimum nýggju, sum Uttanríkisráðið hevur sett av til at promovera Føroyar uttanlands, fer til at gera list atkomandi í øðrum norðurlondum, ella har tað verður satsað.

## »Eg hómi ongan bata«



### LEILA SOLMUNDE

*forkvinna í Meginfelagi teirra brekaðu í Føroyum (MBF)*

**Hvussu fer 2010 at hátta seg fyri borgarar við breki?**
Øll eftirviðgerð í Føroyum til fólk við varandi breki er út av lagi vánalig. Í nógv ár hava ætlanir verið um at betra hetta, men peningur er heldur ikki settur av í 2010. Tí hómi eg ongan bata á eftirviðgerðarøkinum. Hetta hóvar okkum illa í MBF, tí hesi fólk hava ringa lívsgóðsku orsakað av vantandi uppvenjing. Grundarlagið fyri at betra um bústaðarmøguleikarnar er heldur ikki til staðar í 2010. Vit bíða enn eftir tí síðsta partinum av bústaðarpakkanum, sum er »serliga lutaíbúðarlógin«, sum hevur verið ávegis í fleiri ár og er tað enn. Enn mugu nøkur fólk búgva undir trongum og óvirðiligum korum. Vit fegnast um Heilsutrygdina, sum fer at virka í 2010, tí tey, sum eru ringast fyri og brúka sera nógvan heilivág, eru eisini tey, sum fáa størstu hjálpina.

**Hvat vónar tú fyri føroyskan brekaðpolitikk í 2010?**
At samtykti ST-sáttmálin verður eitt veruligt amboð og ikki bara eitt tómt lyfti. At sektorábyrgd kann staðfestast, og at alt lógarsmíð verður í tráð við sáttmálan. At orð verða til handling.

## »Almennu Føroyar hava økt um óvissuna«



### MARITA RASMUSSEN

*stjóri í Vinnuhúsinum*

**Hvussu fer 2010 at hátta seg fyri føroyskt vinnulív?**
Óvissa ávirkar eftirspurningin eftir vørum og tænastum bæði úti og heima. Almennu Føroyar hava økt um óvissuna við ikki at leggja langtíðarætlanir fyri at fáa bygnaðin í føroyska búskapinum í rættlag, bæði fyri vinnu og borgaran. Vónin er tó, at 2010 fer at roynast betri enn 2009. Í 2009 hevur føroyskt vinnulív arbeitt av øllum ávum fyri at trimma fyritøkurnar og soleiðis gera tær betri førar fyri at megna at standa ímóti lága konjunkturinum. Hetta kemur fyritøkunum til góðar, tá eftirspurningurin tekur seg uppaftur, og tað vóna vit, at hann ger út á árið í 2010.

**Hvat vónar tú fyri føroyskt vinnulív og føroyskan vinnupolitikk í 2010?**
Eg vóni, at 2010 verður árið, har landsins politiska leiðsla ásannar týdningin av, at vinnulívið hevur støðugar og forútsigiligar karmar. Hetta merkir, at løggivið verður langfreistað, og at allar vinnur fáa somu viðferð, harímillum at studningur til ávísar vinnugreinar verður avtikin. Eg vóni somuleiðis, at stabilur vinnupolitikkur vil eggja altjóða íleggjarum at gera íløgur í Føroyum, nú alt fleiri fyritøkur skráseta seg á virðisbrævamarknaðinum.

